# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## TAKS - betri umdømi og betri tænastu

TAKS – skattavaldið, er farið á sjarmuherferð til tess at fáa okkum at rinda okkara skatt við gleði. Í áhugaverdari samrøðu her í blaðnum í gjár greiddi skattastjórin frá endamálinum við herferðini.

Um herferðina hjá TAKS sigur stjórin m.a. at stovnurin leggur stóran dent á opinleika og góða tænastu. Hann dugir væl at verja avgerðina um at nýta skattakrónur til upplýsing og til at marknaðarføra tann stovn, ið hann er settur at stjórna. Fremsta uppgávan hjá TAKS er sum vera man at tryggja landskassanum skatta- og avgjaldsinntøkur. Stovunurin skal hereftir verða eyðkendur av at veita góða tænastu. Tað ræður eisini um at gera stovnin betri umtóktan millum manna og er hetta ivaleyst tiltrongt, tí "Skatturin" er her sum aðrastaðir ikki væl umtóktur. Hetta kemur líkasum av sær sjálvum og fáur man rinda sín skatt við gleði. Hetta, at skattagjald er illa umtókt, er fyri alt tað eins gamalt og mannasamfelagið, og mangan hava staðist stórar samfelagsligar broytingar og entá kollveltingar av misnøgd skattagjaldarana.

Tað er alla æru vert, at TAKS roynir at bøta um ta neiligu hugmynd, ið fólk trykjast hava av stovninum. Tað hevur uppaftur størri týdning, at stovnurin við herferðini fær almenningin at skilja, hvat skatta- og avgjaldsinntøkur landskassan verða nýttar til. Tað er kanska ikki tað, sum dagliga liggur okkum fremst í huga, at tann skattur vit við blandaðum kenslum rinda, tryggjar okkum gott undirstøðukervi, heilsurøkt og sjúkraviðgerð á høgum støði og tryggjar okkara børnum góða skúlagongd, teimum ungu góðar útbúgvingar og teimum gomlu ein tryggan aldurdóm.

Nútímanssamfelagið er sera dýrt at reka og sum frá líður vera tað færri herðar til at rinda eitt støðugt dýrari samfelag. Hetta merkir alt annað líka, at útlitini fyri skatta- og avgjaldslættum eru vánalig. Heldur fer tað at ganga hinvegin, at skatta- og avgjaldsbyrðarnar fara at tyngjast, so hvørt nútímanssamfelagið verður útbygt. Útbyggingarmøguleikarnir og nútímansgerðin eru mestsum óavmakrað. Sama er um okkara forvæntningar og okkara krøv til samfelagið at siga. Tað kann tí bert vera gott, at avvarandi myndugleikin ger sítt besta til tess at fáa skattgjaldararnar at skilja skattaskipanina og tær fortreytir, sum her eru galdandi.

Vit gera vónandi ongum órætt, um vit siga, at skattaumstingin ikki altíð hevur virkað optimalt. Tað eru tey, sum siga, at tað hevur verið trupult at sleppa framat myndugleikanum umvegis telefonina og onkur hevur hildið, at tónin mótvegis viðskiftafólkunum kundi onkuntíð havt verið betri. Tað er helst farin tíð. Tað er annars altíð gott við konstruktivum kritikki og eisini við upplýsing, sum skal minna okkum á, hvat okkara skattapengar verða brúktir til. Vit kunnu bara fegnast um, at alt verður gjørt fyri at fáa størri opinleika og forstáilsi millum skattavald og borgara, og at hesi føla, at tey koma hvørjum øðrum við. Hvør av øðrum liva má.

**Sosialurin**

## Klipp, klipp, klipp

MAGNI FLES

Nú er gott ár liðið, síðani klippiskipanin fór at virka. At byrja við gav man sær ikki so nógv far um hana, og eg gangi út frá, at tað er ymiskt, hvat fólk halda um klippiskipanina í dag.

Henda nýggja ferðslulóg minnir meg nógv um, tá ið mvg-lógin kom til landið. Tá var tað onkur, sum mutaði ímóti og segði, at landið var ov lítið til eina so víttfevnandi mvg-lóg. Tá svaraði onkur aftur og segði, at hetta var nakað, sum flest onnur lond nýttu. Í dag síggja vit, hvussu slítandi hon er, og nógv fólk eru givin við sínum virksemi.

Eg meti eisini, at landið er ov lítið til eina so víttfevnandi ferðslulóg, sum í fleiri førum hevur við sær, at tú ikki ført vart teg.

Tað fer at ganga harðast út yvir vinnubilar, av tí at teir koyra nógv víðahvar, og nógva staðni eru vegirnir ikki egnaðir at koyra eftir. Útsýnið er ringt, og tað hendir eisini í dag, at myndugleikarnir gera deyðsfellir fyri fleiri milliónir krónur, hóast teir vita um vandan.

Tað feskasta dømið um tað er rundkoyringin við Borðoyavík í Klaksvík, sum varð gjørd í sambandi við Norðoyatunnilin. Hon er so stór, at hon kemur yvir um eini sethús, og harvið er einki útsýni, tá ið mann kemur frá Bøgøtu. Grundin at slíkt hendir er tann, at myndugleikarnir, sum hava við ferðslutrygd at gera, vilja ikki vita av hvørjum øðrum.

Í dag er tað blivið soleiðis, at ferðslulógin er farin niður í smálutir. Tað allar minsta mistak, sum bilførarin ikki fær vart seg fyri, kann kosta einum persóni ella familju lívgrundarlagið. Mann metir í dag, at fólk oman fyri 50 ár hava lítlan møguleika at klára koyriroyndina. Lógin er eisini soleiðis háttað, at fólk kunnu gera sær dælt av henni.

Áðrenn nýggja ferðslulógin kom í gildi, hoyrdi mann ofta um vandabólkin, sum eru fólk millum 18 og 25 ár, ið tað skuldi gerast nakað við. Sjálvur meti eg, at hann bleiv tann minsti vandabólkurin. Største vandabólkurin í dag eru hýruvognsførararnir. Tá hugi eg um trygdarseðlar, sum vit skulu koyra undir. Tað hendir seg fleiri ferðir, at børn eru komin í bilin, og eg havi bundið tey í trygdarbeltið. Tað grettir ikki, tá ið eg eri komin vegin fram, hevur altíð onkur gjørt seg leysan á vegnum fram. Tá fer tað kalt niður eftir rygginum, tí eg veit, at tað kann kosta mær lívsgrundarlagið, um eg verði hildin aftur av paragraf 13 kanning, og fleiri børn sita leys í bilinum.

Tí havi eg valt at frásiga mær túrar, um eg havi varhugan av, at fleiri børn eru í ferðalagnum, tí tað er alt ov vandamikið fyri meg. Eg havi tí víst kundanum til aðrar bilar, sum taka meir enn 8 ferðandi. Í teimum bilum er eingin beinleiðis lóg um trygdarbelti, og sjálvur haldi eg, at lógin er kappingaravlagandi í hesum førinum.

Eg meti, at tað fara nógv fólk at missa koyrikortið, sum tíðin líðir, bara tí tey hava gjørt okkurt lítið mistak í ferðsluni. Og so kemur at mangla fólk við koyrikorti, og so er bert eitt at gera, og tað er at innflyta útlendska arbeiðsmegi við einari treyt – at tey hava koyrikort.

Sjálvandi kunnu hesi fólk eisini koma í ferðslufelluna, men teirra lívsgrundarlag er ikki í vanda sum so, tey kunnu bara fara aftur til heimlandið og koyra bil sum vanligt. Tað hava tey loyvi til.

Tað eru lond, har tú kanst keypa tær koyrikort. Tað kann blíva ein trupulleiki hjá myndugleikunum at halda skil á, hvat virði hesi koyrikort hava.

Í dag hava vit mest sum onga aðra farleið, sum kann setast ístaðin fyri bilin, og tí eru vit so bundin av honum.

Mær dámar væl, at ferðslulógin verður broytt til tað betra, men ikki soleiðs, at hon tekur so nógv annað við sær, sum geva aðrar sorgarleikir:

Vit fara at missa meira fyri minni.

## Árni Gregersen og Atlantsflog

ÓLAVUR PETERSEN

Eftir at hava brúkt meginpartin av arbeiðsorkuni á Dimmu í vikur upp á Atlantsflog, sigur redaktørurin týskvøldið, at málið er so lítið, at tað hoyrir heima aftan fyri læsta hurð í Vinnumálaráðnum.

Ja, málið átti at veri lítið, sum flestu mál, um politiski og umsitingarligi kulturrurin bara var á leið á rættari kós; tí sambært Dimmu hevði privatur partaeigari (Trons Jet), lagt saman ráð við leiðsluni í Atlantsflogi, at leiðslan skuldi selja partabrøv til Trons Jet fyri yvirkurs.

Virði av hesum skuldi ikki allur gjaldast í reinum peningi, men fyri part av hesum peningi, skuldi leiðslan í Atlantsflogi, verða partaeigarar í Trons Jet.

Sakin er sostatt tann, at leiðslan í Atlantsflogi kann hava lagt ráð saman við Trons Jet, hvussu teir, saman, kunnu fáa ræði á flogfelagnum, tá næsti triðingurin skuldi einskiljast.

At vinnumálaráðið skal klandrast av Christiani Andreasen, nevndarformanni í A. A., fyri at hava tikið notatir av fundum millum seg og ráð, vísir bara, hvussu betent málið er.

Málið er bara lítið, harra Árni Gregersen, tí tað átti at endað áðrenn tað var byrjað, við at Vinnumálaráðið kom á eykaaðalfund við nýggjari nevnd við harraboðum um at skifta leiðsluna út.

Tí hvussu kann Vinnumálaráðið annars tryggja sær, at loyaliteturin hjá leiðsluni er í Atlantsflog og ikki í m. ø. Trons Jet.

Her byrjaði málið í fjør - og hetta má Vinnumálaráðið halda fast um á aðalfundinum 2. apríl.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.